KKRROOSSSOORÐÐ



ætla vit at viðgera innkomna tilfarið hvørt sær.

Mondul høvuðstátturin í innsavningararbeiðinum

Sum eitt lið í innsavningararbeiði savnsins hevur savnið givið út tíðarritið Mondul undir slagorðinum »Hjálpi savninum at savna«. Jóan Pauli sigur okkum, at ritið hevur fingið eina positiva reaktión frá fólki.

— Vit senda fegin bond ókeypis út til fólk, sum hava okkurt at greiða frá, og í hesum sambandi kann eg nevna, at vit taka ímóti øllum tilfari — gamalt sum nýtt.

Í blaðnum Mondul verður m.a. greitt frá tí tilfari, sum savnið hevur og sum tað fær sent frá áhugaðum.

Jóan Pauli Joensen, etnologur: — Fólk, sum hava hug at granska fornminni, eiga at fáa høvi til tess



Gomul mynd av Vestmanna

Útlendingar stóran áhuga fyri innsavningararbeiðinum

— Grannatjóðir okkara hava stóran áhuga fyri fólkalívsfrøðisligari innsavning í Føroyum. M.a. luttók eg í eini gransking úti í Mykinesi í 1973 saman við tveimum svenskum studentum. Sviar lótu í hesum sambandi 8.000 kr. í stuðli til ferðina. Tilfarið, sum fekst burtur úr hesi gransking, fekk Føroya Fornminnissavn ókeypis, sigur Jóan Pauli Joensen.

STØVSÚGVARIN
er hitt **besta tólið**
og tað skal vera
NILFISK

Partafelagið
Maria Poulsen & Co.
Telf. 12000 - 12001